# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*



## Hans Edvard Høghamar

**Pápi okkara farin er**

*Pápi okkara farin er,
ringt tað er at skilja,
eftir vit nú sita her,
ei skilja Faðirs vilja.
Harri ver tú okkum hjá,
til vit pápa aftur sjá.*

*Pápi okkara góður var,
var trúfastur sum fáur,
ei hann spurdi hvør og hvar,
øllum gav hann gávur.
Svárt tað er at missa teg,
ei vit skilja Harrans veg.*

*Inn til okkum sorgin kom,
tað neit so fast í hjartað,
alt var so óskiljandi,
hendan morgun svarta.
Lív mítt fór ein annan veg,
pápi mín eg elski teg.*

*Pápi og mamma vóru eitt,
annað kann ei fara,
tey hvønn annan hava leitt,
gjøgnum lívið harða.
Eftir situr mamma nú,
pápi í himli festi búð.*

*Gráturin seg treingir á,
kemur sum ein alda.
Harrin hjálpa okkum má
her vit ikki valda.
Í hjarta føldist sorg so stór,
tá pápi heim til Harran fór.*

**A.H.**

Fyri 30 árum síðan:

# Pat Boone á Nabb

Í januar eru 30 ár liðin síðan heimskendi amerikanski country- og gospelsangarin Pat Boone saman við familju vitjaði í Føroyum í 1977.

Saman við svenska gospelbólkinum "Samuelsons" hevði Pat Boone tvær væl vitjaðar konsertir í Ítróttarhøllini á Nabb.

Pat Boone, ið tá var tá 42 ára gamal, sang mest andaligar sangir, umframt at hann eisini framførdi nakar av sínum gomlu slagarum.

Tá hann var í Føroyum í 1977, hevði hann selt tilsamans 45 milliónir grammofonplátur, og fyri tað hevði hann fingið 13 single-gullplátur og 7 lp-gullplátur.

Pat Boone er í dag 72 ára gamal. Hann var føddur 1. juni 1934 í Jacksonville í Forida.

*Kelda: Myndaárbókin - árið ið fór 1977*



*Pat Boone er í dag 72 ára gamal. Hann var føddur 1. juni 1934 í Jacksonville í Forida*



*Pat Boone*



*Pat Boone og konan Shirley og tvær døtur teirra á konsert í Ítróttarhøllini á Nabb. Tey eiga annars fýra døtur: Cherry, Lindy, Debby og Laury*

Lesið Sosialin - so eru tit við



## Almenn móttøka

Í sambandi við at Marianna Eystberg tann 1. januar 2007 fór frá vegna aldur, verður almenn móttøka í Stóra Pakkhúsi í Vági fríggjadagin 12. januar kl. 16-18.

Marianna hevur starvast í postverkinum í 26 ár - síðan 1990 sum leiðari í Vági.

Øll eru hjartaliga vælkomin.

Postverk Føroya